

## Leiðari til Dagstovnin Kurl@

Tórshavnar kommuna søkir eftir leiðara, fyri leiðara í farloyvi, at arbeiða 40 tímar um vikuna til Dagstovnin Kurlu@ at byrja 1. november 2006 ella eftir nærri avtalu. Farloyvistíðin er frá 1. november 2006 til 31. mai 2007.

**Vit bjóða**
- eitt áhugavert starv, har tú fært møguleika at seta dám á stovnin
- møguleika fyri ráðgeving

**Vit vænta at tú**
- er útbúgvin pedagogur
- hevur leiðsluroyndir
- kanst arbeiða sjálvstøðugt og taka avgerðir
- hevur hugsjónir um virksemi í einum dagstovni
- hevur hug og áræði at skapa ein fjølbroyttan og tryggan gerandisdag, við virðing og umsorgan fyri tí einstaka barninum, foreldrunum og starvsfeløgunum
- kanst virka í góðum samstarvi við starvsfelagar og foreldur
- dugir væl at samskifta, bæði innan- og uttanhýsis
- hevur teldukunnleika á brúkarastøði
- skal tola møguligar bygnaðarbroytingar

**Setanarviðurskifti**
Starvið verður sett sambært sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Kommunala Arbeiðsgevarafelag Føroya.

**Meiri fæst at vita**
um starvið við at venda sær til Ann Jacobsen, stovnsleiðara, tlf. 353500 ella Frígerð Sundsskarð, deildarleiðara, tlf. 302010.

**Umsókn**
saman við viðmælum, royndum og upplýsingum um útbúgving skal vera Tórshavnar kommunu, Postboks 32, 110 Tórshavn, í hendi í seinasta lagi fríggjadagin 29. september 2006.

**Lesið meira um onnur størv á www.torshavn.fo/leysstorv**

**Tórshavnar kommuna**

# Lærarastarv í Hvalvíkar skúla

Søkt verður eftir einum lærara til írestandi tíðarskeiðið av skúlaárinum 2006/2007 vegna avlopstímar og serligan tørv. Starvið fevnir um 18 undirvísingartímar um vikuna.

**Søkt verður eftir lærara, sum:**
- undir ábyrgd leiðslunnar og í samstarvi við lærarar skúlans, skal undirvísa og taka lut í dagliga arbeiðnum á skúlanum
- dugur at samstarva og er fyrikomandi
- er fúsur at taka uppá seg uppgávur og avbjóðingar, ið eru á skúlanum
- áhaldandi vil vera við til at menna skúlan.

**Lønar- og setanartreytir:**
Starvið er lønt í lønarflokkunum 18.1 – 27.4 sambært avtalu millum Fíggjarmálaráðið og Føroya Lærarafelag. Starvið verður sett sum tíðaravmarkað starv írestandi tíðarskeiðið av skúlaárinum 2006/2007.

**Umsóknir:**
Umsóknir við C.V., avriti av prógvi og møguligum viðmælum skulu vera skúlaleiðaranum, Aslaug Olsen, í hendi í seinasta lagi **mikudagin 27. septembur 2006**, og sendast til:

SUNDA KOMMUNA

**Hvalvíkar skúli**
Att. Aslaug Olsen, skúlaleiðari
430 Hvalvík

Nærri fæst at vita um starvið við at venda sær til skúlaleiðaran á tlf. nr. 422028, 607551 ella 222475.



## Leys størv

**Lívbjargari til Svimjihøllina**

Søkt verður eftir lívbjargara m/k at arbeiða í vikuskiftum. Umframt at vera lívbjargari, eru aðrar arbeiðsuppgávur at røkja.

Setanarviðurskifti: Starvið verður sett sambært sáttmála millum Starvsmannafelagið og Kommunala Arbeiðsgevarafelag Føroya.

Umsóknir skulu verða Tórshavnar kommunu, postsmoga 32, FO-110 Tórshavn, í hendi í seinasta lagi mánadagin 18. september 2006. Viðmerkið umsóknina „Lívbjargari".

Meiri fæst at vita um starvið við at venda sær til Hera Olsen, svimjihallarleiðara, tlf. 302072, ella Jákup Simonsen, deildarleiðara á mentamáladeildini, tlf. 302010.

**Pedagogur til Miðstovnin í Gundadali**

Søkt verður eftir einum pedagogi at arbeiða 35-40 tímar um vikuna at byrja skjótast til ber.

Setanarviðurskifti: Starvið verður sett sambært sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Kommunala Arbeiðsgevarafelag Føroya.

Umsóknir skulu verða Miðstovninum í Gundadali, Gundadalsvegur 6, 100 Tórshavn, í hendi í seinasta lagi mánadagin 2. oktober 2006.

Meiri fæst at vita um starvið við at venda sær til Astu Hjelm, leiðara, tlf. 316042.

**Lesið meira um størvini á www.torshavn.fo/leysstorv**

**Tórshavnar kommuna**



# Stuðul frá FITUR

FITUR er grunnur, sum veitir stuðul innan samstarv millum Føroyar og Ísland, ferðavinnuni at frama.
Stuðul verður veittur innan hesi øki:
Ferðavinnuútbúgving
Samskipan av ferðum - "kombinationsturisme"
Fólksligt millumlandasamstarv, sum gevur vitan innan mentan, livihátt, vinnur v.m.
Samstarv millum flutningsfeløg
Marknaðarføring innan ferðavinnu

Til dømis verður stuðul veittur til:
- Ítróttarfeløg
- Skúlar og útbúgvingarstøð (kunningarferðir)
- Vinnufeløg
- Kommunal samstarvsfeløg
- Vinarbýir
- Hátíðarhald

Umsóknir skulu skrivast á donskum ella enskum og sendast til:

**FITUR**
**c/o Ferðaráð Føroya**
**Postsmoga 118**
**FO-110 Tórshavn**

Evstamark fyri at senda inn umsóknir er **25 september 2006**.
Nærri upplýsing og umsóknarblað fæst á ferðaráðnum, á www.tourist.fo og á www.icetourist.is

ÍSLAND • FØROYAR

petur & petur • 328870